N‡ttu páskafrítí›ina at granska Bíbliuna

Nú páskirnar júst eru farnar aftur um bak, er sera ymiskt, hvussu Føroya fólk hava hátí›arhildi› hesa høgtí›. Nøkur hava veri› saman vi› familju, onnur eru farin uttanlanda, me›an uppaftur onnur als ikki hava havt frí frá arbei›i. Umlei› 70 ungir føroyingar n‡ttu hesa páskafrítí› til naka› eitt sindur ø›rvísi. Tey hava nevniliga í fimm dagar granska› Bíbliuna á Zarepta í Vatnsoyrum

Heini í Skorini

Uml. 70 føroyingar, størsti parturin ungdómur, hava í páskafrítí›ini n‡tt nógva tí› til at seta seg inn í og granska Bíbliuna. Bíbliuskei›i› er fari› fram í leguhúsinum Zarepta á Vatnsoyrum, sum vit eisini kenna sum ta› húsi›, har lega fyri breka›, familjulegur og barna- og ungdómslegur eru um summari›. Eisini n‡ta ymiskar brø›rasamkomur húsi› ígjøgnum veturin til legur í vikuskiftum, og sum heild ver›ur húsi› sera nógv brúkt ígjøgnum ári›, eisini til onnur tiltøk.

Eitt av hesum tiltøkum ver›ur so kalla› "bíbliugranskan", sum er á páskum og á n‡ggjárinum. Hóast Zarepta var› bygt í 1967, hevur júst hetta tiltak ikki sæ› dagsins ljós fyrr enn í 1990. Tá tóku menn stig til tiltaki›, og er ta› fuglfir›ingurin í útlegd í Havn, Pætur M. Hansen, i› hevur ábyrgdina. Uml. 70 luttakarar vóru vesturi á Zarepta umframt bíbliulærarar og fólk, sum arbeiddu í køkinum. Legan var frá 19. til 24. apríl, og evnini á leguni vóru Dániels bók, 1. Tessalonikabræv, Galatiabrævi›, partar av Rómbrævinum og til seinast evni› "trúvir›i trúarinnar". Lærararnir vóru m.a. Pætur M. Hansen, Júst Vang, Jógvan Jacobsen og Sigur› Vang.



Tey umlei› 70 fólkini fylgdu væl vi›, me›an bíbliutímar vóru hildnir

Krevjandi skrá

Um onkur heldur, at hesi fólk hava hildi› frí á páskum, fer hann skeivur. Skráin fyri hesi bíbliugranskan er krevjandi, og ta› krevst, at fólk eru nærløgd og konsentrera›. Undirvíst ver›ur meir enn 10 tímar um dagin, umframt bønarløtur og at lesa uppá skrivliga tilfari›, sum øll fáa í eina mappu.

Hóast hetta so eru ikki serliga gó›ar stundir hjá lærarunum at gjøgnumganga evnini, sum nevniliga kunnu taka drúgva tí›, vi› ta› at ein kann fara sera djúpt. Allir næmingarnir hava eisini høvi til at spyrja og koma vi› síni hugsan um evni›, og sostatt kann ein brúka nógva tí› til hesar bøkur, brøv og evni í Bíbliuni.

Lærararnir hava brúkt uml. tveir mána›ir at fyrireika seg til skei›i› og hava lagt nógva orku í hetta, vi› ta› at hvør næmingur sum nevnt fær alt tilfari› telduskriva› í eina mappu frammanundan. Men vi› ta› at hvør dagur er krevjandi, og skráin er strævin, er sera t‡dningarmiki›, at ein fær nóg nógvan svøvn og er væl upplagdur og konsentrera›ur til næsta dag. Eisini skal leggjast afturat, at undirvísingin ikki bert er solei›is, at øll sita og lurta eftir læraranum, men rúm er eisini fyri bólkaarbei›i og kjaki. Spurningar frá áhoyrarum ver›a eisini vi›gjørdir.

Hóast ta› er intens og krevjandi bíbliuundirvísing, so er eisini tí› til at gera ymiskt anna›, vi› ta› at umhvørvi› kring Zarepta gevur møguleika fyri fleiri aktivitetum. Eitt nú var› skipa› fyri fótbólti á graslíkisvøllinum hvønn dag, i› ve›ri› var til vildar, og var› tann dysturin spældur eftir døgur›a, á›renn aftur var fari› til bíbliuundirvísingina klokkan tvey. Eisini var møguleiki fyri kurvabólti og ø›rum aktivitetum.

Luttakararnir væl nøgdir

Sum vera man, vóru luttakararnir sera væl nøgdir vi› dagarnar vesturi á Zarepta.

- Vit eru sera væl nøgdir vi› bíbliugranskanina. Vit fingu nógv burturúr og lærdu eina rúgvu av tí, sum gjøgnumgingi› var›. Lærararnir vóru væl fyrireika›ir og dugdu væl at greina Skriftina, siga tveir av luttakarunum, klaksvíkingarnir Atli Danielsen og Kristian á Lakjuni, sum eru ávikavist 16 og 17 ára gamlir.

- Hesar dagar hava vit fingi› eyguni meir upp fyri, hvussu áhugaverd og livandi Bíblian er. Hetta hevur eggja› okkum á ein serligan hátt sjálvir at fara at lesa og granska Bíbliuna. Og fekk ein or›i› á onnur, sum høvdu veri› vesturi á Zarepta, fekk man skjótt grei›u á, at ta› var ein sera væleydna› lega, sum tey vóru gla› fyri.

Byrja›i í 1990

Pætur Hansen, sum hevur ábyrgdina av tiltakinum, sigur, at í ár eru li›in júst 10 ár, sí›an bíbliugranskanin byrja›i, og ikki kann sigast anna› enn, at væl hevur gingist í hond.

- Vit byrja›u hetta tiltak í 1990. Vit sóu tá, at tørvur var á bíbliuundirvísing og bíbliukunnleika, og ta› var í stuttum solei›is, ta› byrja›i.

Tá vit so spyrja Pætur, hvussu luttakaratali› hevur veri› hesi 10 árini, sigur hann, at ta› hevur veri› stø›ugt vaksandi.

- Fyrstu fer› vóru gott og væl 20 fólk, sum luttóku í bíbliugranskanini, og í ár vóru uml. 70 luttakarar, so her hevur veri› ein stø›ugur vøkstur, og ta› er jú gle›iligt. Pætur leggur afturat, at sí›ani hetta tiltak byrja›i, hava ikki tær heilt stóru broytingarnar veri› í tilrættalegging og undirvísingarhátti.

-Vit hava alla tí›ina lagt stóran dent á at fáa luttakararnar sjálvar at lesa og granska Bíbliuna, tá teir koma heim. Eg kann brúka ta myndina, at vit geva teimum uppskriftina, og so fara tey sjálv heim at baka kakuna. Ta› er endamáli›. Pætur sigur eisini, at teirra "motto" líka frá byrjan hevur veri› út frá Ápostlasøguni 17,11, har ta› stendur, eftir at Paulus og a›rir høvdu prædika› í b‡num Berøa, at "tey rannsaka›u dagliga skriftirnar, at vita um ta› var so".

Tá vit so spyrja hann, um ta› ikki er strævi› at hava ábyrgd av einum slíkum tiltaki tvær fer›ir um ári›, tá ein eisini hevur í huga, at ta› tekur umlei› tveir mána›ir at fyrireika seg hvørja fer›, sigur Pætur, at ta› heldur hann ikki.

- Tá ein hevur áhuga fyri hesum, fellur ta› ikki serliga tungt at fyrireika seg til eitt evni. Eg haldi, at ta› er meiri gle›i enn strí› at standa fyri einum slíkum tiltaki, tá hugurin er til sta›ar.

Tá Pætur Hansen so at enda ver›ur spurdur, um bíblugranskan aftur ver›ur á n‡ggjárinum, svarar hann, at ta› er ætlanin, um Gud vil, og vit liva.

Pætur undirvísir úr Dániels bók



Hvørjar páskir og hvørt n‡ggjár hevur køksfólki› sín stóra leiklut í, at hetta tiltak yvirhøvur letur seg gera, og í ár var einki undantak